# ítróttur

Nr. 58 • mikudagur • 22. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


## Mjølnir yvirlivdi í bestu deildini

**Týskvøldið vunnu kvinnurnar hjá Mjølnir trygt á Fleyr í avgerandi dysti um, hvat av liðunum skal spæla við í meistaradeildini næsta kappingarár**


FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Í gjárkvøldið var upp- og niðurflytingardysturin í kvinnuflogbólti spældur á Kambsdali.

Mjølnir endaði aftasta í meistaradeildini hjá kvinnum, meðan Fleyr vann 1. deild, og hesi liðini skuldu so spæla ein dyst um, hvat av teimum skal spæla í meistaradeildini næsta ár.

Undan dystinum var Mjølnir mett sum greiður favorittur at vinna. Liðið er mannað við ungum leikarum, og hóast tað kann hava sína ávirkan, tá ið á stendur, so er leikferðin í meistaradeildini so mikið hægri og dystirnir nógv fleiri, so alt talaði fyri Mjølni.

Fleyr spældi eisini uppflytingardyst seinasta kappingarár, men tá vann SÍ greitt.

**Leikferðin var á muni**

Dysturin millum Mjølnir og Fleyr endaði við 3-0 til Mjølnir, sum vann við settúrslitunum 25-21, 25-23 og 25-19.

Fleyr kom stak illa frá byrjan í fyrsta og øðrum setti, men liðið megnaði tó at leggja trýst á Mjølnir. Serliga í øðrum setti gekk púra javnt á. Í triðja setti kom Fleyr væl frá byrjan, men so steðgaði fullkomuliga upp, og í hesum settinum sást, at leikferðin var stóri munurin.

Tá ið Mjølnir setti ferð á álopsspælið, megnaði Fleyr ikki rættiliga at svara aftur, og tí misti liðið ofta fleiri stig á rað. Leikararnir hjá Mjølni vóru betur fyri, og í álopinum vóru fleiri streingir at spæla á.

Sostatt kann Mjølnir fyrireika seg til komandi ár í meistaradeildini.



*Tá ið Mjølnir setti ferð á álopsspælið, megnaði Fleyr ikki rættiliga at svara aftur, og tí misti liðið ofta fleiri stig á rað. Leikararnir hjá Mjølni vóru betur fyri, og í álopinum vóru fleiri streingir at spæla á*

## Venjarin hjá Toda skeldaði í trý korter

**Start-venjarin Tom Nordlie brúkti trý korter til at skelda norsku fjølmiðlafólkini, sum fylgja liðnum á venjingarlegu í Spania**


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Tað gongur lívliga fyri seg á venjingarleguni hjá Toda Jónsson og liðfeløgunum í Spania. Síðani leygardagin hevur Start vant í Marbella, og hóast teir eru staddir langt frá norska gerandisdegnum, hava teir veruliga verið í brennideplinum í fjølmiðlunum.

Mánadagin kundu fleiri norskir fjølmiðlar greiða frá, at tveir av liðfeløgunum hjá Toda fóru til hendurs undir eini venjing. Bård Borgesen og Lunde Aarsheim bæði tókust og slóust, áðrenn ein rúgva av liðfeløgunum mátti skilja teir at.

**Illur um innslag**

Í gjár fingu norsku fjølmiðlafólkini, sum fylgja Start á venjingarleguni í Spania, av at vita frá venjaranum Tom Nordlie. Venjarin er kendur fyri at tosa við greiðum vendingum, og fyrr í ár varð hann biðin um at vera meira positivur mótvegis sínum spælarum.

Í gjár stóðu fjølmiðlafólkini fyri skotum, tí norska TV2 hevði havt eitt innslag um venjingina hjá Start í Marbella. Í innslagnum sæst Nordlie rópa og geyla eftir einum av sínum spælarum.

Nordlie var illur um, at hetta varð víst í innslagnum í norskum sjónvarpi, tí hann helt, at tað varð tikið burtur úr einum samanhangi.

Og tað fingu fjølmiðlafólkini alt at vita um – við stórum stavum og feitari skrift.

**Kroystur venjari**

Tá ið fjølmiðlafólkini vildu tosa við spælararnar eftir venjingina fyrrapartin í gjár, tók Nordlie ímóti teimum, tí hann vildi siga sína hugsa um arbeiðið hjá teimum.

Og tað vóru ikki mjúk orð. Nordlie skeldaði heiður og æru frá fjølmiðlafólkunum í samfull trý korter.

Fedrelandsvennen skrivar, at helst er orsøkin til øðina hjá venjaranum, at úrslitini higartil hava verið vánalig, nógvir spælarar hava verið skaddir, og at hansara leiðsla hevur verið til umrøðu í felagnum.

Seinnapartin í dag skuldi Start spæla venjingardyst ímóti Malaga B.

### Andrew verður nummar 10

Nú danska 1. deild er um at byrja, hava spælararnir hjá Fremad Amager fingið tey tølini á ryggin, sum teir skulu brúka næsta hálva árið. Føroyski álopsspælarin Andrew av Fløtum hevur fingið tað áb yrgdarfulla nummar 10 á ryggin.

– Tað hava verið fleiri broytingar í hópinum, og tað hevur verið eitt sindur tilvildarligt, hvat nummar hvør hevur havt. Nú havi eg roynt at givið spælarunum tað nummarið, sum passar væl til plássið, teir spæla á liðnum, sigur venjarin Benny Johansen.

### Todi plágaður av skaða

Todi Jónsson hevur fingið ein nýggjan skaða at dragast við. Hann hevur í eina tíð havt trupulleikar við hælsinuni, og bruni forðar fyri, at hann av álvara kann verða við í venjing og spæla dystir. Fyrradagin noyddist Todi at gevast undir eini venjing hjá Start í Marbella.

– Tað kennist ikki serliga væl. At vit støðugt skifta undirlag ger heldur ikki støðuna betur, sigur Todi Jónsson við blaðið Fedrelandsvennen.

Trupulleikarnir við hælsinuni hava verið afturvendandi síðani november mánað, og í gjár vandi Todi innandura fyri seg sjálvan.

### Allan liðformaður á Argjum

Nýggir spælarin í AB, Allan Mørkøre, er valdur til liðformann á liðnum hjá argjamonnum. Hetta er fyrsta kappingarárið hjá Allani í AB, men hann hevur drúgvar royndir sum fótbóltsspælari. Allan kom sum blaðungur á besta liðið hjá KÍ og hevur eisini spælt fyri HB, B36 og ÍBV Íslandi. Harafturat hevur Allan spælt 54 landsdystir fyri Føroyar.

– Allan er við sínum nógvu royndum eitt natúrligt val sum liðskipari. Allan slapp fyri fyrstu ferð leygardagin at royna seg í leiklutinum sum liðskipari. Hesum slapp hann stak væl frá, og argjafólk kunnu gleða seg um, at AB vann og Allan skoraði eitt av málunum, skrivar heimasíðan hjá AB.

Varaliðformaður er 22 ára gamli Rani D. Christiansen.